fylgiskjal 7

Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag

**Viðmerkingar hjá FNU; Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag til uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (Náttúrumargfeldislógin)**

Tørvur hevur leingi verið á eini náttúruverndarlóg, og FNU gleðist um, at Heilsu- og innlendismálaráðið hevur gjørt uppskot til hesa nýggju lógina. Lógin verður neyðug til tess at tryggja verandi og komandi ættarliðum eina fjølbroytta náttúru, og viljin at gera eina náttúrumargfeldislóg bendir á, at umhvørvisavbjóðingar verða tiknar í álvara á hægsta politiska stigi.

Umhvørvi og náttúra eiga at verða viðurkend sum týðandi samfelagslig virði, og tíðin er røtt at seta ítøkilig átøk í verk fyri at varðveita náttúrumargfeldi og skapa grøna samfelagsmenning. Náttúrumargfeldislógin fer at seta gongd á arbeiðið at gera týdningarmikil umhvørvismál, sum lýsa støðuna fyri umhvørvi og eini fjølbroyttari náttúru.

Samanumtikið skal lógin:
1) staðfesta og seta í løgfrøðiligar karmar skyldur, sum Føroyar hava tikið undir við sambært altjóða umhvørvissáttmálum, so sum sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi, Veðurlagssáttmálanum og París-sáttmálanum, Rio-sáttmálanum og heimsmálunum um burðardygga menning, sáttmálanum um landsløg og sáttmálanum um heimsarvin. Eisini eigur tað við byrjan at vera ein viðurkenning av, at lívfrøðiliga margfeldið er undir stórum trýsti frá ídnaðarligum virksemi, og at lógin skal tryggja at atlit til náttúru og umhvørvi verða grundleggjandi undir øllum menniskjaligum virksemi.
2) nágreina, at náttúran hevur eitt egiðvirði, sum ikki er treytað av vinnuligari úrtøku. Harumframt skal týdningurin, sum náttúra hevur fyri samleika, mentan, heilsu, sosiala vælferð og lívsgóðsku lýsast og viga í samlaðu metingini, áðrenn loyvi til virksemi verða givin, og lógin skal vísa til, at framtíðar ættarlið skulu hava eins góðar møguleikar, sum undanfarin at fáa hesar ágóðar frá náttúruni. Tað átti at verið nevnt greitt í lógini, at náttúra og menniskjalig vælvera ikki endiliga eru mótsetningar, men at menniskjalig vælvera er í stóran mun treytað av eini fjølbroyttari náttúru.
3) áseta revsing og nágreina fíggjarlig amboð um brot á lógina verður framt, og skaði á náttúruna stendst av virksemi. Gera ítøkilig kriteriu um, hvussu skaði á náttúru verður mettur, og hvat støddin á bótum er.
4) útgreina meginregluna um, at dálkarin rindar og varsemismegisregluna. Vinnurekandi og tey, sum fara í gongd við verkætlanir og útbyggingar, sum viðføra umhvørvisárin, eiga at gera kanningar av umhvørvisárini og umhvørvisváða frá virkseminum. Tað skal greidliga verða staðfest, hvørjar skyldurnar eru, eisini um skylduna at fáa tilvega hagtøl um umhvørvisstøðuna.
5) áseta, at almenni myndugleikin tryggjar, at fólkaræðisligar tilgongir verða fylgdar í málum, sum hava árin á náttúru og umhvørvi, og at upplýsingar eru fingnar til vega. Krav skal vera um, at myndugleikar taka fólk og áhugafelagsskapir við í avgerðir, at hesi hava kærurætt og harumframt hava møguleika at taka avgerðir fyri ein dómstól.

6) ikki brúka veikar orðingar so sum “miðast skal eftir” og “rímiligt”. Verður “rímiligt” brúkt, skal hugtakið verða supplerað við mátum fyri at staðfesta, hvat er rímiligt.
7) banna innflutningi av ílegubroyttum verum (GMO).
8) hava ávirkan á aðrar lógir, t.d. alilógina. Tað skal t.d. vera krav um, at hædd verður tikin fyri náttúru áðrenn aliøki verða avmerkt og alilovi verða givin, og sama skal vera galdandi fyri orkuútbyggingar, tunnilsgerð og vegagerð, havnir, bústaðarbygging o.a, sum hevur árin á náttúru. Eisini skal tað vera gjørligt at geva bót t.d. um alilaksur sleppur úr aliringum.
9) taka hædd fyri náttúru, sum ikki er sjáldsom ella hótt, men hevur týdning fyri matveitan, heilsu og rekreatión hjá íbúgvum, og sum bindari av koltvíiltu. Tað skal vera krav, at umhvørvisgreiningar verða gjørdar, tá ætlanir verða gjørdar, t.d. ferðavinnuætlan og orkuætlan. Lógin skal staðfesta, at livandi og jarðfrøðiligt tilfeingi hevur samfelagsligan týdning, og skal seta treytir til kravdar metingar av náttúruinntrivum tá víðkað verður um virksemi, ella nýtt virksemi kemur í øki. Hetta skal ikki einans vera galdandi fyri verndarøki, men alt óbygt øki uttan ídnaðarligt virksemi.

Ítøkiligar viðmerkingar:

kap 1 § 1: nevna at náttúran hevur eitt egiðvirði, óavhengigt av tí hon gevur fólki.

§ 2: “Lógin fevnir um føroyskt landøki, eisini áir, vøtn, ósar og løkir, og føroyskt sjóumveldi.”
*Lógin fevnir eisini um luftrúm og geisling.*

Kap. 2 § 4: ov veikt orðað. Hvussu verður mett hvat er rímiligt? Hetta skal ásetast í lógini.

§ 6: “Verður virksemi útint sambært loyvi frá almennum myndugleika, er varsemisskyldan at rokna sum lokin, um fyritreytirnar fyri loyvinum framvegis eru til staðar.” Vinnurekandi sum hava fingið loyvi at reka virksemi skulu eins og øll onnur vera undirløgd varsemisskylduni.

§ 8: Umhvørviskanningar og dáta frá hesum skulu samlast í einum vitanarbanka. Fyritøkur, sum ætla at reka virksemi í náttúruøki, rinda fyri at framleiða vitan um náttúrustøðuna.

§ 9: Virksemi skal ikki byrja fyrrenn vitan um náttúruavleiðingar er tøk. T.d. skal gýtingarøki hjá sílum ikki verða órógvað, sum á Sundi, har ongar kanningar vórðu gjørdar. Ella sum á Víkum har eingin kanning av náttúru er gjørd.

§ 12: “Umhvørvisgóð tøkni” er ikki eitt hóskandi orð at lýsa hugtakið “best available technology”. Tað er nóg mikið at brúka orðið “tøkni”.

§ 21 stk. 3: Ábyrgdin at gera vart við at hótt sløg ikki verða vard eigur ikki at liggja hjá einstaklingum og áhugafelagsskapum. Einstaklingar og áhugafelagsskapir eiga altíð at verða tikin í álvara, men tað eigur at vera skyldan hjá umhvørvismyndugleikunum at tryggja, at hagtøl um umhvørvisstøðuna verða savnað og fylgja við í gongdini, greina vandan og taka støðu til hvørji átøk skulu gerast fyri at betra um støðuna.

Kap. 4 § 25: Ílegubroyttar verur (GMO) skulu ikki innflytast.

§ 30: verndarøki hava harumframt týdning fyri at binda kolevni (carbon sinks) og eru sostatt avgerandi fyri at minka alheimsupphitingina. Verndarøki hava eisini týdning fyri at tryggja burðardygga matveiting av fuglum, fiskum og plantum úr náttúruni – sostatt týdning fyri sosiala burðardygd.

§ 36, stk. 5: her verður sipað til "altjóðarætt". Havast skal í huga, at ein altjóða sáttmáli ikki er tað sama sum altjóðarættur, tí hann skal setast í lógarkarmar í einstøku londunum, áðrenn hann fær virknað. Lógin skal tí eisini tryggja, at brot á altjóða sáttmálar verða rættarfylgd og revsing verður ásett.

§ 49, stk. 3: Tað skal vera skyldan hjá almennum umhvørvismyndugleikum - og ikki felagsskapum og einstaklingum - at gera kanningar av náttúrustøðuni í landinum.

Kap. 7, § 53: Lógin eigur at innihalda ásetingar viðvíkjandi innfluttum ílegubroyttum plantum. Reglur eiga at verða gjørdar fyri invasiv sløg og bann fyri ílegubroyttum plantum. Genbanki skal gerast.

§ 61, 3): Ístaðin fyri "nýggjari tøkni" eigur at standa "*mannagongdum ella tøkni*"

§ 69: Støddin á bótini skal ásetast.

Tórshavn hin 27. mai 2018

Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag